# Jólakalendarin 2005

# Jólini í Hvannadali

**Partur 7**

Og meðan øll fólkini klappa av gleði fara Stampi og Anthonio upp á pallin og yvir til mikrofonina. Anthonio, sum ongantíð hevur tosað í mikrofon, vil fegin siga okkurt, men Stampi skúgvar hann so harðliga burtur, at eitt suð fer gjøgnum mannamúgvuna.

- Tað er ræðuligt, hasin jólamaðurin er harðligur, teskar Trølla Pætur í oyrað á ommu síni.

- Tvass í teg, sigur Trølla Omman, hatta má man tola. Stampi fer nú heilt yvir til mikrofonina.

- Hey fittu børn. Vit eru ordiliga góðir við tykkum, og tí ætla vit at stjala..... nei eg meini leggja gávur undir jólatræið hjá tykkum í nátt. Tá tit vakna í morgin, so liggur ein jólagáva frá okkum undir trænum – halda tit ikki at vit eru fittir?

- JÚÚÚ, rópa øll børnini. Men fyrst fara vit at tendra jólatræið, sigur Stampi.



Borgarstjórin vísir teimum tað stóru kontaktina, sum teir skulu tendra jólatræið við. Stampi og Anthonio stilla seg við kontaktina og taka báðir um hana. Borgarstjórin spyr børnini, um tey eru tilreiðar.

- JAAA, rópa øll børnini.

- Jólamenninir, eru tit klárir?

Stampi og Anthonio nikka.

- So fara vit at telja niður. 10, 9, 8, 7, 6, 5, 4, 3, 2, 1 og núúúú..

Anthonio og Stampi koyra kontaktina niður, og alt jólatræið lýsir upp.

- Uhha tað er flott, ljóðar tað frá mannamúgvuni, og øll klappa bæði leingi og hart.

Stampi og Anthonio eru ikki sørt ernir av, at øll klappa fyri teimum, so teir sløkkja og tendra jólatræið enn eina ferð. Men tá leypur borgarstjórin til og sigur, at tað muga teir ikki gera aftur.

Borgarstjórin fer aftur yvir til mikrofonina.

- Nå, góðu borgarar, áðrenn vit í felag syngja Gleðilig Jól, sum er tað síðsta á skránni í kvøld, so fari eg at takka barnakórinum í Hvannadali fyri teirra góðu og vælljóðandi sangirnar. Og ikki minst, so vil eg eisini takka jólamonnunum fyri, at teir vildu koma at tendra jólatræið í ár. Nú er skjótt songartíð hjá børnunum, men áðrenn tit fara, so fari eg at takka tykkum øllum fyri, at tit møttu so fjølment upp og fari eg at ynskja tykkum øllum eini gleðilig jól.

Fólkini klappa fyri borgarstjóranum, sum saman við Stampa og Anthonio fer av pallinum aftur. Og meðan fjøldin syngur Gleðilig Jól, takkar borgarstjórin Stampa og Anthonio enn einaferð fyri, at teir vildu vitja Hvannadal.

Teir takka sjálvir fyri og siga, at teir mugu fara víðari.

Teir ganga skjótt aftur um eitt húsarhorn og renna so alt teir eru mentir niðan frá bygdini.

Teir hyggja aftur um seg fyri at vita, um nakar hevur sæð teir, men har er einki at síggja.

*Puntur 9 til jólakalendaran*



*Puntur 10 til jólakalendaran*



*Puntur 11 til jólakalendaran*




